SKYN

Nýtt

# Ikki bert ognir, men heim



## TÓRSHAVN
Sethús, Tinghúsvegur 79

| | | | |
|---|---|---|---|
| 210 | 342 | 2 | |

Stór sethús nærindis miðbýnum. Húsini eru í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini er gongd, køkur, stova, kamar og vaskirúm/fýrrúm. Í ovaru hæddini er gongd, baðirúm, goymslurúm og fýra kømur. Fyri trimum árum síðan varð at kalla alt gjørt av nýggjum innan, og tá varð eisini ein nýggjur tilbygningur gjørdur. Eitt nýtt úthús á 50 m² hoyrir eisini til ognina. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og sera hugnaligum umhvørvi í býnum tætt við viðarlundina og ítróttaøkið í Gundadali.

Prísuppskot: kr. 2.250.000








SENDISTOVAN

## TÓRSHAVN
Íbúð, Berjabrekka 185



| | | | |
|---|---|---|---|
| 92 | 122 | 2 | 1989 |




Sera hugnalig og ljós íbúð í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er durur, baðirúm, køkur og stova. Í niðaru hæddini er gongd, vesi/vaskirúm og tvey kømur. Útgongd er til terassu í niðaru hæddini. Møguleiki er at byggja einar 24 m² uppí. Íbúðin er í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við góðum grannalagi, og spælipláss er beint uttanfyri. Góð parkeringsviðurskifti. Stutt er til handils, og býlingshús er tætt við. Busssambandið er gott.

Prísuppskot: kr. 1.600.000

## EIÐI
Sethús, yviri í Gjógv 12



| | | | |
|---|---|---|---|
| 345 | 1365 | 3 | 1953 |




Stór sethús í trimum hæddum. Í miðhæddini er durur, gongd, baðirúm, køkur, spísistova, stova og trý kømur. Á loftinum er gongd, baðirúm, køkur, stova og trý kømur. Í niðastu hæddini er kjallararúm, hjallur, vaskirúm, fýrrúm og tvey onnur rúm. Eisini hoyrir eitt bilhús og úthús til húsini. Húsini eru frá 1953, men ymsar umvælingar vórðu gjørdar í 1985. Húsini standa eystan fyri kirkjuna á Eiði.

Prísuppskot: kr. 1.100.000